LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 11. desember 2015
J.Nr.: LUM-22- 14/00003-16
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

viðvíkjandi klagu um vantandi frítøku fyri kringvarpsgjald

Við skrivi, dagfest 4. juni 2014, hevur A sent umboðsmanninum klagu um vantandi frítøku fyri kringvarpsgjald. Í klaguni verður eitt nú skrivað:

> "A vil hervið kæra viðgerð og avgerð Mentamálaráðsins, og harvið eisini Kringvarp Føroya, av kæru send til Mentamálaráðið um kringvarpsgjald (sjónvarps- og útvarpsgjald).
>
> A rekur handilin B og D, sum bæði liggja á ...gøtu/...gøtu. B og D hava sama v-tal ..., og verður eittans ársroknskapur gjørdur fyri hesi bæði. Harafturat eru tað partvís somu starvsfólk, sum starvast á báðum støðum ...
>
> A skal hervið kæra Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya fyri ...
>
> - At Mentamálaráðið ikki tolkar, at internet brúkt til gjaldskortterminalar og at telda, ið bert verða brúkt sum kassaskipan, ikki er at roknað sum neyðug hjálpartól.
> - So at siga allir handlar hava í dag teldu sum kassaskipan. Somuleiðis er bert møguligt at keypa gjaldskortterminalar í dag, sum virka yvir internetið.
> - At Mentamálaráðið tolkar ikki rætt § 4 stk. 2 *"Arbeiðspláss kunnu verða frítikin fyri at rinda tann partin av kringvarpsgjaldinum, ið er fyri sjónvarp, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava sjónvarpstól **ella** internetsamband"*.
> - Verður orðið "ella" sligið upp í orðabók, merkir hetta ...val millum tveir el. fleiri møguleikar. Hetta burði Mentamálaráðið vita, ið er avvarðandi myndugleiki hjá Málráðnum og Fólkaskúlaráðnum.
>   Hvørki B ella D hava sjónvarp. Hetta er váttað í kæruni til Mentamálaráðið. Harumframt er ikki møguleiki at síggja sjónvarpssendingar hjá Kringvarpi Føroya í gjaldskortterminalinum ella í telduni, meðan hon verður brúkt sum kassaskipan í arbeiðstíðini. ..."

## Málsgongd

Við skrivi, dagfest 8. juli 2014, svarar Umboðsmaðurin klagaranum, at hann avvísir part av klaguni, og tekur part av klaguni til nærri kanning. Skrivið er soljóðandi :

**“Viðvíkjandi klagu tygara, dagfest 4. juni 2014**
Eg havi móttikið klagu tygara um avgerð Mentamálaráðsins, dagfest 29. apríl 2014 um gjaldskylduna hjá A at rinda kringvarpsgjald, og um viðgerðina hjá Mentamálaráðnum í sambandi við arbeiðið at broyta kunngerðina um kringvarpsgjald.

Sambært § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000) tekur umboðsmaðurin sjálvur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í einum máli, sum klagað verður um.

Eftir at hava lisið klagu tygara og skjølini skal eg boða tygum frá, at eg ikki haldi grundarlag vera fyri at gera meira við tann spurningin í klagu tygara, sum snýr seg um, hvørt A skal gjalda eitt kringvarpsgjald fyri hvønn bústað, eins og eg ikki fari at gera meira við tann partin av klaguni, sum snýr seg um viðgerðina hjá Mentamálaráðnum at gera broytingar í kunngerðina um kringvarpsgjald.

**Spurningurin um A skal rinda eitt kringvarpsgjald fyri hvønn bústað**
Grundgevingin fyri at eg ikki fari at kanna spurningin um kringvarpsgjald fyri hvønn bústað nærri er, at sambært § 7, stk. 3 í kringvarpslógini (løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2014), hava virki, stovnar og onnur arbeiðspláss, har fleiri fólk eru í starvi, ella sum hava høli, har tikið verður móti viðskiftafólkum, skyldu at rinda kringvarpsgjald. Í hesi áseting hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta reglur um gjaldskylduna fyri bústaðareindir, virki, stovnar o.o. Hetta hevur landsstýrismaðurin gjørt við millum annað § 3, stk. 4 í kunngerð nr. 146 frá 18. desember 2013 um kringvarpsgjald, har tað framgongur, at virki, stovnar o.o., ið reka virksemi á fleiri bústøðum, gjalda eitt kringvarpsgjald fyri hvønn bústað. Tað framgongur av málinum, at A hevur tveir bústaðir, og eg havi tí ikki viðmerkingar til kæruniðurstøðuna hjá Mentamálaráðnum um, at virkir, sum verða rikin frá fleiri bústøðum, skulu rinda kringvarpsgjald fyri hvønn bústað.

**Viðgerðin hjá Mentamálaráðnum í sambandi við arbeiðið at broyta kunngerðina um kringvarpsgjald**
Viðvíkjandi spurninginum um viðgerðina hjá Mentamálaráðnum í sambandi við gerð av kunngerð um kringvarpsgjald skal eg viðmerkja, at myndugleikin ikki hevur skyldu til at senda einum borgara uppskot til kunngerð til hoyringar. Hetta er eisini galdandi, hóast myndugleikin viðger eitt ítøkiligt mál sum klaguna hjá tygum. At myndugleikin gerst varugur við, at ein kunngerð eitt nú ikki er nóg greitt orðað, ella at kunngerðin hevur onkrar manglar, broytir ikki hesa støðu.

**Spurningurin um internetsamband og hjálpitól**
Í klaguni til mín vísa tygum á, at hvørki B ella D hava sjónvarpstól í handlunum, men at handlarnir hava internetsamband. Internetsambandið verður nýtt í sambandi við gjaldskortterminalanar og teldur, sum verða brúktar til kassaskipanina í hølunum hjá A.

Eg havi gjørt av at taka henda partin av klagu tygara til viðgerðar.

Eg havi tí í dag biðið Mentamálaráðið um at greiða mær nærri frá heimildini í § 7, stk. 5 í kringvarpslógini við atlit at ásetingini í § 4, stk. 2 í kunngerð um kringvarpsgjald um internetsamband, eins og eg havi biðið Mentamálaráðið um at greiða mær nærri frá, um atlit eru tikin til dømi, sum verður nevnt í viðmerkingunum til heimildarlógina ...”

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 8. juli 2014, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við freist til 1. september 2014. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Skrivið frá Umboðsmanninum til Mentamálaráðið var soljóðandi:

> “ **Viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 4. juni 2014**
> Eg havi fingið eina klagu frá A um kæruavgerð, dagfest 29. apríl 2014, hjá Mentamálaráðnum. Avrit av klaguni er hjálagt.
>
> Eg havi partvíst avvíst hesa klaguna, tó havi eg gjørt av at kanna tann partin av klaguni, sum viðvíkur heimildarspurninginum um frítøku av sjónvarpspartinum av kringvarpsgjaldinum nærri. Avrit av skrivi mínum til klagaran er viðlagt tykkum til kunningar.
>
> **Spurningurin um internetsamband og hjálpartól**
> Í klaguni vísir klagarin á, at hvørki B ella D hava sjónvarpstól í handlunum, men at handlarnir hava internetsamband. Internetsambandið verður nýtt í sambandi við gjaldskortterminalar og teldur, sum verða brúktar til kassaskipanina í hølunum hjá A og ikki til at hyggja eftir sjónvarpi við.
>
> Heimildin at frítaka arbeiðspláss er í § 4, stk. 2 og 3 í kunngerð um kringvarpsgjøld (kunngerð nr. 106 frá 18. november 2010 um kringvarpsgjald, sum broytt við kunngerð nr. 146 frá 18. desember 2013) er soljóðandi:
>
> > “ Stk. 2. Arbeiðspláss kunnu verða frítikin fyri at rinda tann partin av kringvarpsgjaldinum, ið er fyri sjónvarp, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava sjónvarpstól ella internetsamband.
> > Stk. 3. Arbeiðspláss kunnu verða frítikin fyri at rinda kringvarpsgjald, um einans hjálpitól, ið hava annað endamál enn at móttaka sendingar hjá Kringvarpi Føroya, eru á arbeiðsplássinum.”
>
> Mentamálaráðið hevur í avgerð sínari víst á, at fyri at verða frítikin fyri sjónvarpspartin av kringvarpsgjaldinum, skal arbeiðsplássið sambært § 4, stk. 2 í kunngerð um kringvarpsgjald skrivliga vátta, at tey ikki hava sjónvarpstól ella internetsamband. Sambært niðurstøðuni hjá Mentamálaráðnum kann A ikki frítakast fyri sjónvarpspartin av kringvarpsgjaldinum, tí virkið hevur internetsamband.
>
> Harumframt vísir Mentamálaráðið á, at A heldur ikki kann frítakast fyri sjónvarpspartin av kringvarpsgjaldinum sambært § 4, stk. 3 í kunngerð um kringvarpsgjald, tí Mentamálaráðið metir, at telda við internetsambandi sum kassaskipan, er ikki at meta sum eitt hjálpitól fevnt av undantaksregluni í § 4, stk. 3 í kunngerðini um kringvarpsgjald.
>
> Sambært § 7, stk. 5 í kringvarpslógini hevur landsstýrismaðurin heimild við kunngerð at áseta neyvari reglur um tól, ið kunnu verða frítikin fyri gjaldskyldu, og hvørjar umstøður kunnu gera seg galdandi fyri, at Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu.
>
> Viðmerkingunum í løgtingsmáli nr. 160/2009 “Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp” § 1, nr. 3, ið eru serligu viðmerkingarnar til § 7, stk. 5, eru soljóðandi:

"Til stk. 5. Øll tey, sum annars koma undir gjaldskyldu, kunnu verða frítikin fyri hesa skyldu í eitt ávíst tíðarskeið, sum Kringvarp Føroya ásetur, um tey lata Kringvarpi Føroya eina váttan um, at tey ikki hava tól, ið kann móttaka sendingarnar hjá Kringvarpi Føroya. Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur, um tól kunnu verða frítikin fyri gjaldskyldu. Her verður hugsað um dømi, har tólið kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, men hevur eitt annað høvuðsendamál."

Tað framgongur ikki av orðaljóðinum í § 7, stk. 5 í kringvarpslógini ella av viðmerkingunum til ásetingina, at landsstýrismaðurin hevur heimild at avmarka frítøkuna av sjónvarpspartinum av kringvarpsgjaldinum í sambandi við, at virkir v.m. hava internetsamband.

Mentamálaráðið verður í hesum sambandi biðið um at greiða mær nærri frá heimildini í § 7, stk. 5 í kringvarpslógini við atlit at ásetingini í § 4, stk. 2 í kunngerð um kringvarpsgjald um internetsamband, eins og Mentamálaráðið verður biðið um at greiða frá, um atlit eru tikin til tað dømi, sum verður nevnt í viðmerkingunum til heimildarlógina, ið nevnir tól, ið kunnu móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, men hevur eitt annað høvuðsendamál. Eisini verður biðið um grundgevingina fyri, at Mentamálaráðið metir at internetsamband kann javnmetast við "tól" sambært kringvarpslógini. "

Tann 27. august 2015 gav Mentamálaráðið soljóðandi viðmerkingar:

**"Viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 4. juni 2014**
Vísandi til áheitan frá Løgtingsins Umboðsmanni dagfest 8. juli 2014 við svarfreist tann 1. september 2014 viðvíkjandi einari klagu frá A dagfest tann 29. apríl 2014, biður Løgtingsins Umboðsmaður Mentamálaráðið um at greiða nærri frá trimum viðurskiftum:

1) Greiða nærri frá heimildini í § 7, stk. 5 í kringvarpslógini við atlit at ásetingini í § 4, stk. 2 í kunngerð um kringvarpsgjald um internetsamband.

2) Mentamálaráðið verður biðið um at greiða frá, um atlit eru tikin til dømið, sum verður nevnt í viðmerkingunum til heimildarlógina, ið nevnir tól, ið kunnu móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, men hevur eitt annað høvuðsendamál, og

3) Løgtingsins Umboðsmaður biður harumframt um grundgeving Mentamálaráðsins fyri, at internetsamband kann javnmetast við "tól" sambært kringvarpslógini.

Ad. 1.
Orðaljóðið í § 7, stk. 5 í kringvarpslógini ásetur:

*Húski, bústaðareindir, virki, stovnar o.o. sambært stk. 2 og 3 kunnu í eitt ávíst tíðarskeið verða frítikin fyri gjaldskylduna, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava tól, sum kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, tað veri seg í húsi/íbúð, í báti, í bili ella í summarhúsi. Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um tól, ið kunnu verða frítikin fyri gjaldskyldu, og* ***hvørjar umstøður kunnu gera seg galdandi fyri*** *( framhevjing Mentamálaráðsins), at Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu."*

Umframt at heimila landsstýrismanninum at áseta neyvari reglur um tól, ið Kringvarp Føroya kann frítaka frá gjaldskylduni sbrt. § 7, stk. 5, 2. pkt. 1. lið, heimilar ásetingin landsstýrismanninum at áseta neyvari reglur fyri, hvørjar umstøður kunnu gera seg

> galdandi fyri, at Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu sbrt. § 7, stk. 5, 2. pkt, 2. lið.
>
> Av tí at tað gerast alsamt fleiri sløg av tólum, ið kunnu móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, er móttøkan av nevndu sendingum í sera stóran mun treytað av, at húski, virki v.m. hava internetsamband.
>
> Vísandi til omanfyri standandi metir Mentamálaráðið, at internetsamband sbrt. § 4, stk. 2 í kunngerðini er ein umstøða sambært § 7, stk. 5, 2. pkt. 2. lið í lógini, ið ger seg galdandi fyri, um Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu. Á hesum grundarlagi metir Mentamálaráðið, at tað er lógarheimild fyri hesi áseting í kunngerðini.
>
> Ad. 2.
> Talan er um eitt undantak til gjaldskylduna, sum skal tulkast avmarkandi, tí í prinsippinum kunnu øll í Føroyum halda uppá, at tól teirra hevur eitt annað *høvuðs*endamál enn at móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya. Hetta skal ikki skiljast sum ein møguleiki hjá teimum flestu at blíva frítikin frá nevnda gjaldi við teirri fylgi, at Kringvarp Føroya missir sítt inntøkugrundarlag.
>
> Í sambandi við hjálpitól hevur Mentamálaráðið serliga hugsað um hjálpitól til persónar, sum vegna likamligt brek kunnu brúka eitt nú eina teldu sum samskiftismiðil, og harvið hevur hjálpitólið sum høvuðsendamál at lætta um gerandisdagin hjá viðkomandi. Hugsað hevur ikki verið um gjaldskyldug tól, ið brúkarin metir hava eitt annað høvuðsendamál enn at móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, um brúkarin eitt nú nýtir eina gjaldskylduga teldu við internetsambandi til eina kassaskipan.
>
> Ad. 3.
> Sum nevnt undir *ad.1.* hevur landsstýrismaðurin heimild til at áseta neyvari reglur um gjaldskyldug tól, og hann hevur harumframt heimild til at áseta neyvari reglur um umstøður, ið kunnu gera seg galdandi fyri, at Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu. Mett verður, at internetsamband er ein tílík umstøða, ið sostatt kann javnmetast við tól, har internetsambandið sum umstøða í teimum allarflestu førunum er avgerandi fyri, um ein brúkari við alskyns nýmótans tólum á marknaðinum kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya."

Við skrivi, dagfest 9. september 2014, vórðu viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 23. september 2014 móttók umboðsmaðurin viðmerkingar frá klagaranum, har hann m. a. hevur hesar viðmerkingar:

> **"Viðmerkingar til svar frá Mentamálaráðnum**
> Fyrst skal viðmerkjast, at líknandi sak er roynd í svenskum dómstóli, har dómstólurin kom til ta niðurstøðu, at internet kann ikki síðustillast við sjónvarps-/útvarpstól.
>
> Í okkara føri hava vit internet og teldu við eittans endamáli. Endamálið er at brúka telduna og internetið til kassaskipan, so at vit kunnu taka móti peningi fyri tær vørur og tænastur, sum vit selja ...
>
> Viðmerkingar til Ad.3:
> Sum nevnt fyrst í hesum skrivi er dómur sagdur í norðurlendskum rætti um at internet/telda kann ikki síðusetast við sjónvarpstól. Eg fari at biðja Løgtingsins umboðsmann um at

kunna seg um hendan dóm og viðurskiftir sum síðusetast við hetta mál."

Við skrivi, dagfest 24. september 2014, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Mentamálaráðið til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Mentamálaráðið hevði ikki meir at viðmerkja til málið, og fór umboðsmaðurin eftir hetta undir endaligu viðgerðina av málinum.

**Niðurstøða**

A hevur 5. juni 2014 sent klagu um viðgerð og avgerð hjá Mentamálaráðnum um kæru um kringvarpsgjald. Klagan er í trimum pørtum.

Umboðsmaðurin gjørdi av bert at taka tann partin av klaguni upp, sum snýr seg um, um virkið kann verða frítikið fyri at gjalda kringvarpsgjald.

A hava sambært tí, sum upplýst verður, hvørki sjónvarp ella útvarp, men internet, sum saman við teldu bert verður brúkt til kassaskipanina og gjaldskortterminalar.

Klagarin hevur víst til svenskan hægstarættardóm um frítøku fyri kringvarpsgjald, um talan er um tól, sum ikki eru ætlað sum sjónvarps ella útvarpstól. Hesin dómur kann eftir míni metan ikki beinleiðis yvirførast á føroysk viðurskifti, tí svensku og føroysku lógarreglurnar um skylduna at rinda kringvarpsgjald og frítøkumøguleikarnar byggja ikki á somu meginreglur.

Sambært kringvarpslógini § 7 stk. 3 (løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010) hava eitt nú arbeiðspláss, sum hava fleiri fólk í starvi ella taka móti viðskiftafólki, skyldu at gjalda kringvarpsgjald.

Eftir § 7 stk. 5 kunnu arbeiðspláss í eitt ávíst tíðarskeið verða frítikin fyri gjaldskylduni, um tey undirskriva váttan um, at tey ikki hava tól, sum kunnu móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya. Í stk. 5 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta neyvari reglur um tól, ið kunnu verða frítikin fyri gjaldskyldu, og hvørjar umstøður kunnu gera seg galdandi fyri, at Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu.  Hetta er gjørt í kunngerð nr. 106 frá 18. november 2010 um kringvarpsgjald, sum varð broytt við kunngerð nr. 146 frá 18. desember 2013.

§ 4 í kunngerðini viðger spurningin um frítøku fyri arbeiðspláss at rinda kringvarpsgjald og er soljóðandi :

> **§ 4.** Kringvarp Føroya kann gera frávik frá ásetingunum í § 3, stk. 3, um serligar umstøður gera seg galdandi. Serligar umstøður kunnu t.d. vera ...
>
> *Stk.2.* Arbeiðspláss kunnu verða frítikin fyri at rinda tann partin av kringvarpsgjaldinum, ið er fyri sjónvarp, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava sjónvarpstól ella internetsamband.
>
> *Stk.3.* Arbeiðspláss kunnu verða frítikin fyri at rinda kringvarpsgjald, um einans hjálpitól, ið hava annað endamál enn at móttaka sendingar hjá Kringvarpi Føroya, eru á arbeiðsplássinum.

Staðfest er, at A hevur fleiri fólk í starvi, hevur internetsamband og teldu í báðum handlunum, og at arbeiðsplássið kemur undir skyldu at rinda kringvarpsgjald eftir reglunum í § 7 stk. 3 í kringvarpslógini. Eisini má staðfestast, at arbeiðsplássið hevur tól, sum kann móttaka sjónvarps- og útvarpssendingar frá Kringvarpi Føroya.

Sambært § 4 stk. 2 kann arbeiðspláss verða frítikið fyri at rinda tann partin av kringvarpsgjaldinum, ið er fyri sjónvarp, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava sjónvarpstól ella internetsamband. Í hesum máli er staðfest, at A hevur internetsamband og tól (teldu), sum uttan at vera sjónvarp, kann móttaka sjónvarpssendingar. Frítøka kann tí ikki veitast eftir reglunum í § 4 stk. 2 í kunngerðini.

Eftir § 4 stk. 3 kann arbeiðspláss verða frítikið fyri at rinda kringvarpsgjald, um einans hjálpitól, ið hava annað endamál enn at móttaka sendingar hjá Kringvarpi Føroya eru á arbeiðsplássinum. Mentamálaráðið vísir í hoyringarsvari sínum á, at endamálið við hesi áseting er, at persónar við likamligum breki, sum brúka teldu sum samskiftismiðil fyri at lætta um gerandisdagin hjá sær, kunnu verða frítikin fyri at rinda kringvarpsgjald. Tað framgongur tó ikki av orðaljóðinum í § 4 stk. 3, at endamálið við hjálpartólum er hetta.

Spurningurin er, um telda og internetsamband, sum sambært klagaranum bert verður nýtt til gjaldskortterminalar og kassaskipan, og hvørs endamál ikki er at taka móti sendingum frá Kringvarpi Føroya, kann roknast sum eitt hjálpitól (hjálpartól) eftir § 4, stk. 3 í kunngerðini.

Bæði teksturin í kunngerðini og viðmerkingarnar frá Mentamálaráðnum nevna orðið: "hjálpitól". Hetta orð finst ikki í føroyskum orðabókum, men er skilligt av samanhanginum, at hugsað verður um "hjálpartól"**.** Eg havi onga orsøk til at halda, at hetta ikki eisini er galdandi fyri kunngerðina, t.v.s hóast orðið er skrivað "hjálpitól" er sipað til orðið "hjálpartól".

Sambært føroysku orðabókunum eru "hjálpartól" tól til hjálpar, serstakliga hjá avlamnum fólki. At hjálpa merkir sambært somu orðabókum at gera beina, stuðla ella styðja.

Vanliga málsliga fatanin er sostatt, at frítøkan í § 4 stk. 3 er treytað av, at arbeiðspláss, sum hevur tól, sum kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, bert kann vera frítikið fyri kringvarpsgjald, um tólið er hjálpartól til fólk sum bera brek.

Sambært hesi málsligu tulking meti eg, at telda og internet, sum verða nýtt til kassaskipan og gjaldskortterminalar, ikki eru at rokna sum hjálpartól í mun til § 4 stk. 3, tí hesi eru ikki tengd at eini støðu, har brúkarin ber brek.

Eg eri sostatt samd við niðurstøðuni hjá Mentamálaráðnum um, at A ikki lýkur krøvini fyri at verða undantikið at gjalda kringvarpsgjald. Eg geri tískil ikki meir við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður